# Risa tónleikatiltak í miðbýnum

**Tíðliga í summar verður skipað fyri einum risa tónleikatiltaki í miðbýnum í Havn. Tiltakið verður í tveir dagar, og væntandi fara góðir 60 tónleikabólkar og einstaklingar at spæla**

TÓNLEIKATILTAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tiltakið, sum verður vikuskiftið 2. og 3. juni í miðbýnum í Havn, tá ið eisini Mentanarnátt er, verður heilt nágreiniliga í Tórsgøtu. Tað er Margarinfabrikkin, ið hevur tikið stig til tiltakið, og júst Margarinfabrikkin kemur at hava ein týðandi leiklut undir sjálvum tiltakinum.



*Tá ið kongaliga vitjanin var seinasta summar, spældi unga manningin úr Paradox á einum palli á parkeringsøkinum uttan fyri Sjómansheimið, júst soleiðis sum ætlanin er í sambandi við stóra tiltakið í summar.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Seks spælistøð

Fyrireikararnir av tónleikatiltakinum hava fingið loyvi til at steingja Tórsgøtu av hesar báðar dagarnar, og at kalla øll neyðugu loyvini eru fingin til vega.

Ikki færri enn seks ymisk spælistøð verða nýtt til tiltakið. Fimm av teimum, Margarinfabrikkin, Gríma, Miðlahúsið, Sjómansheimið og Snarskivan eru innandura, og harumframt verður gjørdur ein stórur pallur á parkeringsøkinum uttan fyri Sjómansheimið.

Høvuðsendamálið við tiltakinum er at seta føroyskan tónleik í miðdepilin, og at varpa ljós á tað fjølbroytta tónleikaumhvørvi, sum vit hava í Føroyum, siga fyrireikararnir.

## Bert føroyskur tónleikur

Allur tónleikurin, ið verður framførdur og spældur á stóra tiltakinum, verður føroyskur. Ætlanin er, at útboðið av tónleiki skal spenna so víða sum gjørligt, soleiðis at nakað verður fyri allar aldursbólkar.

Tí verður eitt nú bæði føroyskur dansur, poppur, punk, gospel, kór, blues og tungur rokkur á skránni hesar dagarnar, soleiðis at nakað verður fyri øll. Júst hvørji nøvn borðreitt verður við, er ikki greitt enn, men hetta verður væntandi kunngjørt í næstum.


www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera virðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. februar, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.


# Damor fer at byggja á Hjalla



*Í summar brendi táverandi bygningurin hjá Damor úti á Argjum, og nú verður skjótt farið undir at byggja ein nýggjan bygning á Hjalla*

*savnsmynd*

**Mánadagin samtykti byggi- og býarskipanarnevndin hjá Tórshavnar Býráð at geva Damor byggiloyvi til nýggjan vinnu- og handilsbygning á Hjalla**

NÝBYGGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bygningurin hjá Damor kemur at verða, har sum gamla grótbrotið á Hjalla er, og hann fer at hava eina samlaða gólvvídd upp á 2.700 fermetrar.

## Ikki nøkur glæstriborg

Per Mortensen, stjóri hjá Damor, sigur, at nú kommunan hevur samtykt at veita byggiloyvi, verður farið undir at innheinta tilboð upp á stoypiarbeiði.

– Eg vóni, at tað fer at ganga skjótt, soleiðis at vit sleppa í gongd í vár. Tekningarnar liggja klárar, so tað er at bara at fara í gongd. Eg veit ikki, nær tað verður liðugt, men eg vóni, at vit sleppa undan at verða her í hesum kalda goymslubygninginum hjá Poul Mohr ein vetur afturat, hóast her er gott at verða, sigur Per Mortensen.

Stjórin í Damor dugir ikki at siga, hvussu nógv nýggi bygningurin fer at kosta, men hann roknar ikki við, at bygningurin verður serliga dýrur, tí talan verður ikki um nakra glæstriborg, men um ein funktionellan bygning, sum hann málber seg.